## MRCC / TR

# Avloysari til Tórshavnradio

**Hervið verður lýst eftir feriuavloysara til Tórshavnradio.**

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Ganga lurtivaktir.
- Bakvaktir.
- Luttaka í venjingum.
- Vanligt fyrifallandi arbeiði á vaktunum.

**Førleikakrøv:**
- Nautiska, fjarritara ella aðra viðkomandi útbúgving.
- Arbeiðsroyndir frá sjóvinnu og royndir við radiosamskifti.
- Duga at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli.
- Kunnleika til teldur.
- Góð samstarvsevnir.

Setanin er tíðaravmarkað frá viku 24 til og við viku 33.

Lønin er tímaløn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí. Tænastustaðið er Tórshavnradio.

Skrivlig umsókn við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 1. mai 2010.

**Umsóknir skulu sendast til:**
*MRCC Tórshavn*
*Tinghúsvegur 64*
*100 Tórshavn*

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til 231311, og tosa við leiðaran Robert J. Olsen.

## Studentaskúlin og HF-skeiðið í eysturoy og Klaksvíkar HF-skeið

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi tørvar okkum komandi skúlaár undirvísarar í:
**Føroyskum, donskum, enskum, søgu, støddfrøði og tónleiki.**

Harumframt eru nøkur **ársvikariat** leys í lærugreinunum:
**Ítrótti, søgu, samfelagsfaki og enskum**

Tað finnast tímarestir (4 tímar ella færri) í:
**Evnafrøði, alis-/evnafrøði, heimspeki, latíni og alisfrøði.**

**Umsóknarfreistin er 20. apríl 2010.**

Á www.shey.fo liggur starvslýsingin í fullari longd.
Á www.gymnasiejob.dk liggur ein donsk útgáva.

## MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Tíðaravmarkað størv sum einalærari í Tjørnuvík og í Kunoy

Størvini sum einalærari í Tjørnuvíkar skúla og í Kunoyar skúla verða lýst leys til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2010 - 31. juli 2011.

**Um størvini**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum. Størvini eru fulltíðarstørv og tíðaravmarkað skúlaárið 2010/11.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgdina av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Størvini eru flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av lærarapróvgi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 14. apríl 2010.**

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um størvini, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.

**Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279 · FO-110 Tórshavn**
**Tel. 30 65 00 · Faks 30 65 55 · mmr@mmr.fo**

# Fundur um Mentanarnáttina

**Feløg, stovnar og einstaklingar, sum hava hug at vera við, eru vælkomin á Kunningarstovuna í Havn á fund týsdagin kl. 10.00**

**Kunningarstovan**

## Runavíkar kommuna

søkir eftir

# Leiðari til Dagtilhaldið í Runavíkar kommunu

Endamálið hjá dagtilhaldinum er at geva pensiónistum og eldri fólki í Runavíkar kommunu møguleika og umstøður at møtast til fjøltáttað ítriv í hugnaligum umhvørvi. Dagtilhaldið fer at halda til í hølunum hjá Eldrafelagnum Nón, har eldri fólk frammanundan møtast til hugnaliga samveru.

Dagtilhaldið verður skipað sum tilboð undir Sosialu deild í Runavíkar kommunu.

Uppgávan hjá leiðaranum verður, saman við teimum eldru, at skipa fyri og menna virksemi í dagtilhaldinum.

**Vit leita eftir leiðara, ið**
- dugur væl at skipa fyri
- er skapandi (kreativur)
- megnar at gera hugskot til veruleika
- hevur góð samstarvsevni
- evnar at skapa pláss og rúm so at tey eldru sjálvi eru virkin
- hevur viðkomandi útbúgving og/ella royndir

**Setanarviðurskifti**
Starvið er hálvtíðarstarv og lønin er sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000

**Søk starvið**

Umsókn við avriti av møguligum prógvi og viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. apríl 2010

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139
FO-610 Saltangará

## Krabbameinsfelagið

Aðalfundur felagsins verður á Krabbameinsfelagnum, Grønlandsvegur 58, Tórshavn, týskvøldið 20. apríl kl. 19.00. Skrá sambært lógum felagsins.

**Krabbameinsfelagið**